FERÐSLUTRYGD

# Virkir gerast limir í Ferðslutrygd

Virkir fáa nú møguleika at gerast limir í Ferðslutrygd.

Síðani oktober hevur ferðslutrygd arbeitt við einum nýggjum átaki. Hetta snýr seg um, at fáa vinnulívsfyritøkur at gerast limir í Ráðnum fyri Ferðslutrygd og harvið gerast ferðslutrygdarstuðlar og luttaka beinleiðis í arbeiðinum at gera ferðsluna tryggari.

Sjálvsagt skal vinnulívið hava ein virknan lut í ferðslutrygdararbeiðinum. Vinnulívið er jú so stórur partur av ferðsluni.

Ein fyritøka, sum gerst Ferðslutrygdarstuðul, sýnir at hon hevur ábyrgdarkenslu og professionella tilvitan um leiklut sín í samfelagnum. At taka henda spurning í álvara, er umráðandi fyri eina og hvørja fyritøku. Í fyrsta lagi er tað ein sannroynd, at ferðsluóhapp kosta fyritøkum nógvan pening, umframt menniskjaligu líðingina, sum kemur aftaná. Í øðrum lagi styrkir positivur atburður í ferðsluni eisini umdømið, sum fyritøkan hevur at liva av.

Eisini í grannalondum okkara verður arbeitt við átøkum, ið miða eftir at fáa einstaklingar og virkir at luttaka í kjakinum um ferðsluspurningar. Menningin gerst avgjørt meira burðardygg, um so er, at brúkarin sjálvur hevur ávirkan á gongdina. Skulu vit koma nærri 0-hugsjónini mugu øll taka ábyrgd.

Higartil hava hesar fyritøkur tekna seg sum ferðslutrygdarstuðul.

Føroya Shell
AMA
SMS
Bakaríðið Hjá Gunnleivi
Statoil
Bókadeild Føroya Lærarafelag
Vaktargarður
Farodane
H T Transport
Flogfelag Føroya
BR-leikur
Føroya Banki
Føroya Keypssamtøka
Føroya Lívstrygging
Føroya Sparikassi
Føroya Tele
Hotel Føroyar
Inni P/F
SLFarmur
Poul HANSEN

Frámerkið at seta á bilin.
Kaupting
Koyrikortið Sp/f
Leif Mohr
Meginfelag Búnaðarmanna
Meinhardt Arge

# Nýggi føroyski 500-krónuseðilin

**Í dag, 30. november, fáa Føroyar nýggjan 500-krónuseðil. Hesin seðilin er tann fjórði í nýggja seðlaraðnum. Gomlu 500-krónuseðlarnir verða enn í gildi, men verða settir úr gildi so við og við**




TÍÐINDASKRIV

Myndaevnið framman á nýggja 500-krónuseðlinum er framparturin á einum fjørukrabba. Fjørukrabbin er vanligur í fjøruni allastaðni í Føroyum. Myndaevnið av krabbanum er prentað í koparprenti. Aftan fyri krabban er vatnlitamynd av sandbotni. Myndaevnið aftan á seðlinum er vatnlitamynda av Hvannasundi. Vatnlitamyndina av Hvannasundi hevur Zacharias Heinesen málað.

Nýggi 500-krónuseðilin er 155 x 72 mm. Høvuðsliturin er dustgrønur.

500-krónuseðlilin hevur sum 100-krónuseðilin og 200-krónuseðlilin heilmynd (hologram). Heilmyndin skal saman við hinum trygdunum, vatnmerki og rútatráði við litskifti tryggja, at seðlarnir verða ikki falsaðir.

Seinasti nýggi pengaseðilin – 1000-krónuseðilin – kemur væntandi á sumri í 2005.

Gomlu 500-krónuseðlarnir verða enn í gildi, men verða settir úr gildi so við og við.

# Gjørnumbrot fyri norðurlendsk LGBT lesandi



Minnist til tann 21. novembur 2004. á hesum degi varð ANSO, felagsskapur av norðurlendskum LGBT feløgum fyri lesandi stovnað. LGBT er stytting fyri "Gay, Lesbian, Bisexual and Transgender" ella sam-, bi- og transkynd. Luttakandi vóru lesandi úr øllum tí norðurlendska økinum.

Vit samlaðust her i Danmark fyri at skapa ANSO, tí vit mettu, at vi hava nógv til felags, hvør í sær við virðismiklum royndum. Endamalið við ANSO er at deila okkara vitan, og fremja medvitan um LGBT málum hja lesandi. Vit ynskja at skapa positivt tjak og gera okkum sjónlig gjørnum okkara konferencur. ANSO vil vera ein hugskapandi "tænke-tank", og kelda til íblastur hja norðurlendskum LGBT feløgum hjá lesandi.

ANSO hevur sítt høvudssæti i Føroyum. Nuverandi limir eru: FSS - Félag STK stúdenta frá Reykjavík, Iceland, HG - Homoglobiini R.Y frá Helsinki, Finland, Sveriges Förenade Gaystudenter (SFG), UgleZ frá Bergen, Norway, BLUS frá København Danmark og Friðarbogin úr Føroyum. Í hesum sambandi eru Føroyar viðurkendar sum tjóð, og Friðarbogin sum felagsskapur fyri lesandi.

Í framtíðini ynskja vit at víðka okkara samarbeiði til at fevna um so nógv LGBT feløg fyri lesandi i tí norðurlendska økinum sum gjørligt.

Sameind eru vit sterk.

Nevndin er:

| | |
|---|---|
| ISLAND: | Ásta Ósk Hlöðversdóttir |
| +354 868 6855 | (formaður) |
| FØROYAR: | Manijeh Elsa Modi |
| (+45) 28922575 | (næstformaður) |
| DANMARK: | Maren Fich Granlien |
| (+45) 28408449 | (kasser) |
| SVØRIKI: | Maria Hansson |
| NOREG: | Hallvard Øren |
| FINLAND: | Linda Vapalahti |

Kontakt í Friðarbogan:
Manijeh Elsa Modi manijeh@diku.dk
(+45) 28922575

Vit vilja heita á tykkum um at skriva nakrar reglur um okkum. Vit lata okkum fegin interviewa.

Ein serlig áheitan til felagsskapir fyri lesandi sosum MFS og møguliga FUR um at gera vart við ANSO i limabløðum og tílíkt. Vit hava eina ferðafrásøgn um vikuskiftið upp til stovnandi aðalfundin, sum møguleiki er at bjóða fram sum blaðgrein.